in

felagnum, men kann kortini í dag staðfesta, at áhugin fyri felagnum er vaktur.

– Fólk úr stórum parti av landinum hava longu sett seg í samband við meg. Tey hava ringt úr Havn, Runavík, Norðoyggjum og aðrastaðni í Eysturoynni.

– So nú er klárt hjá okkum at leggja til brots, sigur Mortan.

Ætlanin er bert at gera smærri arbeiðir fyri fólk. Og tí verða slíkar uppgávur sum húsabygging og líknandi ikki partar av virkseminum í Húsa- og Garðsrøkt.

### Inni og úti

Tá ein tosar um bygdina Morskranes so verður hon neyvan sett í samband við ídnaðarøki, vinnumøguleikar og ídnað.

Tú hevur koyrt gjøgnum Strendur og ert farin um Eystnes, og nú liggja tríggjar bygdir fyri framman. Tann mittasta teirra er Morskranes.

Fyri mong er hetta helst at meta sum ein sovibygd, har neyvan nógv virksemi er at hóma.

Men her finst kortini hetta felagið við tí rættiliga breiða og umfatandi navninum "Húsa- og Garðsrøkt". og Mortan Justesen ætlar kortini, at hetta felagið skal liva upp til sítt navn:

– Endamálið við hesum felagnum er at kunna veita fólki ymiskar smærri húsatænastur.

– Vit ætla tí at bjóða fram eitt tilboð til fólk, sum fevnir um snøgt sagt øll smærri arbeiði innanveggja og uttanfyri: Bæði máling, velting, elarbeiði, tapetsering og mangt annað, sigur Mortan.

Umframt hesar tænasturnar so hevur hann í eina tíð havt eitt lítið virki, sum hevur framleitt flísar til urtagarðar, og er hetta virkið eisini ein partur av tilboðnum til fólkið.

Hann hevur gjørt ymsar royndir við hesum flísunum, og fólk hava tikið væl ímóti teimum.

– Vit hava roynt at leggja okkum eftir at gera arbeiðið so væl og so bíligt sum gjørligt, samstundis sum fólk eru við til at stuðla føroyskari arbeiðsmegi, sigur Mortan.

### Á rættari leið

Hetta felagið á Morskranesi er rættiliga nýtt, og hevur enn ikki lýst so nógv og hevur í aðrar mátar ikki gjørt nógv vart við seg fyri almenninginum.

Teir hava kortini havt lýsingar í dystarbløðunum, sum hondbóltsfelagið á Strondum – StÍF – hevur givið út í sambandi við heimadystir sínar.

Hóast hesa spøku byrjanina, so er kortini líkt til at fólk kring landið hava givið hesum felagnum gætur. Tí Mortan hevur longu nú fingið bíleggingar úr størum pørtum av landinum.

– Hetta gevur okkurt mót til at halda fram. Og gevur okkum eisini hug til at halda fram, tí vit soleiðis fáa at vita, at vit eru á rættari leið, sigur Mortan Justesen.

Tá sagt verður "vit", so leggur Mortan dent á, at hann fyri sovítt er einsamallur í felagnum. Men eru aðrar uppgávur, enn hann sjálvur megnar, so hevur hann avtalur við aðrar menn um at hjálpa til í arbeiðinum.

Teir hava í eina tíð arbeitt við at fyrireika hesa tænastuna, og vænta, at teir fara til arbeiðis av álvara um ein mánað ella so.



*– Eg hevði hug at royna okkurt annað. Tá eg so sá, at eingin annar framleiddi flísar í Føroyum, var hetta ein upplagdur møguleiki at bróta upp úr nýggjum, sigur Mortan, sum nú bjóðar seg fram sum húsavørð hjá fólki og fyritøkum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# – Upplagdur møguleiki at bróta upp úr nýggjum

**Mortan Justesen sigur, at felagið bjóðar sær til at virka sum húsavørðar fyri feløg og fyritøkur**

VINNUMØGULEIKAR
*Snorri Brend*

**Morskranes:** Tað er sjálvandi altíð ilt at meta um, hvør fer at gera nýtslu av tilboðnum frá Húsa- og Garðsrøkt. Men Mortan væntar, at serliga eldri fólk fara at gera brúk av tí.

Í mongum húsum eru ofta smærri uppgávur at loysa, og er eingin handverkari í húsinum ella í familjuni, so er neyðugt at fara til aðrar.

Støðan er her mangan, at trupult er mangan at fáa fatur á einum handverkara, meðan aðrir als ikki tíma so væl at gera slíkar smærri umvælingar og ábøtur á hús. Tí kunnu hesi arbeiði gerast rættiliga kostnaðarmikil hjá fólki.

Summastaðni hava fólk ein rættiliga stóran garð, sum sjálvandi krevur røkt ein stóran part av árinum. Tey makta ikki hetta, og tí hevur hetta nýggja felagið eisini ein møguleika at gera slík arbeiði fyri fólk.

– Tað er tí kanska rættast at siga, at okkara felag fer at virka sum ein pedeltænasta, sum fevnir bæði um garðin og tekjuna hjá fólki, sigur ein bjartskygdur Mortan.

Ein annar partur av tilboðnum hjá Mortani er at virka sum húsavørður á støðum, har ein hevur brúk fyri einum slíkum, men har ein kanska ikki hevur ráð at hava ein slíkan í fulltíðar starvi.

Her kunnu so virkir og stovnar, sum vilja hava bygningar sínar hildnar viðlíka, gera brúk av tænastuni hjá Húsa- og Garðsrøkt á Morskranesi.

### Gera sum mest sjálvur

Ein spurningur, tá ein fer undir slíkt virksemi, er altíð: Hvagani kom hetta hugskotið við flísunum?

– Hetta er ikki nakað kollveltandi hugskot sum so. Eg arbeiddi á skipasmiðjuni á Skála í mong ár, men gavst so, tí eg hevði hug at royna okkurt annað.

– Eg sá, at eingin annar framleiddi flísar í Føroyum. Og hetta var tí ein upplagdur møguleiki at bróta upp úr nýggjum, sigur Mortan um hesa ætlanina, sum nú verður víðkað við tí nýggja tilboðnum.

Tann handverksliga partin av tænastuni er í góðum hondum hjá Mortani, men annars verður hann væl stuðlaður av øðrum handverkarum, sum fara at hjálpa honum í arbeiðinum.

Hann hevur longu gjørt avtalu við eitt elvirki, og er talan um størri timburuppgávur eru menn til taks at arbeiða eisini í hesum.

– Annars ætli eg mær at gera sum mest sjálvur, sigur Mortan.